ítróttur

Nr. 74 • mikudagur • 16. apríl 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

# Stór móttøka fyri VB kvinnunum

**Stórfingin móttøka var í Vági, tá hondbóltskvinnurnar leygarkvøldið komu heim sum meistarar**

ÍTRÓTTUR
*Orð og myndir: Dagfinn Olsen*

Tað eru meira enn 50 ár síðani, at VB kvinnur gjørdu vart við seg á toppinum á sama hátt sum í dag. Og tí var stór móttøka, tá VB kvinnurnar komu heim leygarkvøldið sum meistarar, greipuvinnarar.

Í høllini var samkoma við nýyrktum sangum, røðum og fagnaði, umframt flottari køku, sum var eftirger av Vágshøll og annars smurdum breyði og leskandi afturvið.

Umboð fyri kvinnuliðið, sum fyri meira enn 50 árum síðani vóru á ovastu rók í føroyskum hondbólti, komu á pall. Tær fingu heilsu og N.P. Nolsøe greiddi teirra vegna skemtiliga frá viðurskiftunum tá í tíðini.

Og steyp og heilsanir til VB kvinnurnar trutu ikki. Borgarstjórin, Jógvan Krosslá, taldist millum røðararnar, og at hann er VB viðhaldsmaður er ikki løgið, tí á liðnum eigur hann bæði døtur og abbadøtur.

Eftir røður, sang og ábit, var stórur dansur við Hans Jacobi og Vinmonnum og rómurin vardi til ljósan morgun.





*Jógvan Krosslá, borgarstjóri. Í baksýni sæst kvinnuliðið, har hann eigur døtur og abbadøtur*



*Kaja og Betta vóru á liðnum hjá VB, sum gjørdi vart við seg á ovastu rók fyri meira enn 50 árum síðani. Her fáa tær heilsu frá John Henrik Holm, formanni í VB*



*Guðrið Mortensen hevur fingið steyp frá Jógvani Krosslá, sum eisini er abbi hennara*



*Greipuvinnararnir fingu gylta greipu í part*





# KÍ-kvinnurnar vunnu stórsigur í fyrsta umfari



*Greipuvinnararnir úr Klaksvík byrjaði landskappingina væl í ár. Tær vunnu heili 11-0 á FS Vágum um vikuskiftið.*
*Mynd: SáH*

## HB vann ársins fyrstu grannauppgerð

KVINNUR
*Páll Holm Johannesen*

Landskappingin hjá kvinnunum fór av bakkastokki um vikuskiftið. Kvinnudeildin í ár er skipað sum ein deild við tíggju feløgum. Eftir ætlan skuldu fimm dystir leikast um vikuskiftið, men bert tríggir teirra vórðu avgreiddir.

Havnarfeløgini B36 og HB brustu saman fríggjakvøldið, og í fyrstu grannauppgerðini í ár, var tað eldra havnarfelagið, ið var omaná. Dysturin endaði 3-1 til HB, eftir hálvleikstøðuna 2-1. Dysturin var javnur, har bæði liðini skiftust um at hava leikliga yvirvág.

Úr Gundadali verður sagt, at á dystinum sást, at kappingarárið júst er byrjað, og at leikararnir ikki enn eru í bestu venjingastøðu.

Ása á Neystabø legði B36 frammum tíðliga í fyrra hálvleiki, meðan HB svaraði aftur við málum frá Kristinu Simonsen og Fríðu Petersen. Seinasta málið í dystinum skeyt Malan á Dunga seint í seinna hálvleiki til endaligu støðuna 3-1.

Havnarfeløgini fara helst bæði at mynda oddin í kvinnudeildini í ár, har tey skulu royna at rista Kí av trónini, sum fremsta liðið í kvinnudeildini.

### KÍ stórsigur

Sunnudagin fekk KÍ vitjan av FS Vágum, og greipuvinnararnir vunnu ein knúsandi 11-0 sigur. Sum úrslitið sigur, so var talan um einvegis ferðslu allan dystin. Stóri leikarin í Klaksvík sunnudagin var Malena Josephsen, sum skeyt heili sjey mál.

Toppskjúttin í kvinnudeildini í fjør, Rannvá Andreasen, skeyt trý mál og Vivian Bjartalíð fekk eitt. Úr Klaksvík verður sagt, at stórur munur var á liðunum, og dysturin var sjón fyri søgn, at munur er at vera í oddinum í 1.deild og leika í 2.deild.

FS Vágar hevur ikki áður verið umboðað í bestu deildini, og tí kann tað tykjast ein stór uppgáva at møta greipuvinnarunum longu í fyrsta umfari, áðrenn leikararnir hava vant seg við leikferðina í bestu deildini.

### Rakul gjørdi bart

Á Krossinum í Sumba hevði Sumba vitjan av EB/Streymi um vikuskiftið. EB/Streymur vann 3-0, eftir ein málleysan fyrra hálvleik.

EB/Streymur hevur ikki havt kvinnulið í fleiri ár, men í ár hevur sundalagsfelagið boðað frá luttøku. Liðið er einamest mannað av leikarum,ið eisini leika í deildin gentur 14-17. Ein av leikarunum úr gentum 14-17 ár gjørdist stóri leikarin sunnudagin. Bert 15-ára gamla Rakul Magnussen, hevði seinasta fót á í øllum trimum málunum hjá EB/Streymi, so tað var ikki eitið á fyri debut í vaksnamannadeildini.

Rakul hevur ikki máltev frá ókendum, tí pápin Bergur Magnussen, var seinast í áttati árunum ein av vandamiklastu áleyparunum í føroyskum fótbólti.

### Leika aftur annan páskadag

Annað umfar í kvinnudeildini verður annan páskadag. Dystirnir eru: EB/Streymur-B71, Sumba-KÍ, FS Vágar-B36, HB-AB og B68-GÍ.

**1.umfar í tølum**
**Sumba-EB/Streymur**
**0-3 (0-0)**
0-1 Rakul Magnussen
0-2 Rakul Magnussen
0-3 Rakul Magnussen

**B36-HB 1-3 (1-2)**
1-0 Ása á Neystabø
1-1 Kristina Simonsen
1-2 Fríða Petersen (br)
1-3 Malan á Dunga

**KÍ-FS Vágar 11-0 (5-0)**
1-0 Vivian Bjartalíð
2-0 Rannvá Andreasen
3-0 Rannvá Andreasen
4-0 Malena Josephsen
5-0 Malena Josephsen'
6-0 Malena Josephsen
7-0 Malena Josephsen
8-0 Malena Josephsen
9-0 Malena Josephsen
10-0 Rannvá Andreasen
11-0 Malena Josephsen

**AB-B68 útsettur**

**GÍ-B71 útsettur**

